


## KOMANDI TILTØK

**4. desember** verður føroysk jólagudstænasta við Hera Joensen, presti í Dómkirkjuni í Reykjavík. Aftaná verður hugnaløta í Sjó-mansheiminum Ørkini.

**6. desember** er sendimaðurin boðin til móttøku hjá finska sendiharranum í sambandi við 99 ára frælsisdag Finnlands

**8. desember** á middegi, er sendimaðurin boðin til døgurða hjá ES sendiharranum.
Um kvøldið er sendimaðurin boðin til móttøku hjá japanska sendiharranum í sambandi við føðingardagin hjá japanska keisaranum.

**13. desember** luttekur sendimaðurin í døgurða saman við starvsfólkum í ísl. Uttanríkisráðnum.

**14. desember** um kvøldið bjóðar svenski sendiharrin til jólahugna.

**19. desember** bjóðar danska sendikvinnan til jólaborðhald.

## POLITISKA STØÐAN EIN MÁNAÐ EFTIR VALIÐ

Eftir valið, 29. oktober, gjørdist politiska støðan meira avbjóðandi enn vanligt. Fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð (burtursæð frá 1987), so fingu 7 flokkar umboð í Altingið. Við valið í 1999, 2003, 2007 og 2009 vórðu 5 flokkar valdir í Altingið. Í 2013 vóru tað 6 flokkar, sum vórðu valdir á ting. Hóast tað í 2013 vóru 6 flokkar mótvegis 5 við undanfarnu 4 valum, so vísti úrslitið greitt, at tveir teir størstu flokkarnir (Sjálfstæðisflokkurin og Framsóknarflokkurin) fingu greiðan meiriluta (38 altingslimir av 63). Vanligt hevur verið at skipa stjórn við tveimum flokkum, tó undantikið í 1987 og í 2009.

Við seinasta val (29. oktober) fingu 7 flokkar umboð í Altingið og myndin gjørdist sjáldsama fløkt. Teir báðir høgravendu flokkarnir, sum høvdu myndað stjórn fram til valið, fingu bert 29 altingslimir (Sjálfstæðisflokkurin (21) og Framsóknarflokkurin (8)). Vinstravendu flokkarnir fingu 23 altingslimir (Vinstrihreyfingin - grænt framboð (10), Píratar (10), Samfylkingin (3)). Miðflokkarnir fingu 11 altingslimir (Viðreisn (7) og Björt framtíð (4)).

*» Miðflokkarnir gjørdu beinanvegin samstarvsavtalu eftir valið, soleiðis at flokkarnir bert samráddust saman. Hetta hevði við sær, at hvørki høgra- ella vinstravendu flokkarnir kundu skipa samgongu, uttan at báðir miðflokkarnir vóru við. At fáa samgongu í lag tvørturum miðjuna, hevur higartil ikki verið gjørligt. «*




Mynd 1. Samstarvið millum miðflokkarnar – Viðreisn og Björt framtíð – hevur higartil havt við sær, at gjørligt hevur ikki verið, at skipa samgongu, tí teir hava verið tungan á vágskálini, so leingi vinstra- og høgraflokkarnir ikki kunnu finna saman. Fyri at fáa meiriluta krevst 32 altingslimir.

Fyrst royndi formaðurin í Sjálfstæðisflokkinum – Bjarni Benediktsson – at skipa samgongu millum Sjálfstæðisflokkin (21), Viðreisn (7) og Björt framtíð (4). Hesir



*Mynd 2. Benedikt Jóhannesson (v.m.), form. í Viðreisn og Óttarr Proppé, form. í Björt framtíð, samráðast saman.*

flokkarnir høvdu 32 av 64 altingslimum, sum var minst møguligur meiriluti. Sum skiltist, so ynskti Sjálfstæðisflokkurin at breiðka um parlamentariska grundarlagið og ynskti at fáa Framsóknarflokkin (8) við í stjórnarsamstarvið, men tað vildi Viðreisn á ongan hátt. Eftir lutfalsligari stuttari tíð, sleit Bjarni Benediktsson samráðingarnar við tí grundgeving, at tað var fólkaatkvøða um ES og endurskipan av fiskivinnuni, sum skiltu partarnar.

Síðani fekk forkvinnan í Vinstrihreyfingin - grænt framboð – Katrín Jakobsdóttir heimild frá forsetanum at skipa stjórn. Katrín Jakobsdóttir royndi at skipa eina vinstra miðstjórn millum flokkarnar Vinstrihreyfingin - grænt framboð, Píratar, Samfylkingin, Viðreisn og Björt framtíð. Hesir flokkar hava tilsamans 34 altingslimir. Samráðingarnar millum flokkarnar vóru komnar rímiliga langt. Partarnir sótu í arbeiðsbólkum og viðgjørdu týðandi politisk mál. Men so sleit Viðreisn og Björt framtíð samráðingarnar við m.a. teirri grundgeving, at flokkarnir ikki kundu semjast um hækkandi gjald hjá fiskivinnuni, skattahækkingar og búskaparlig viðurskifti.



*Mynd 3. Katrín Jakobsdóttir, forkvinna í Vinstrihreyfingin - grænt framboð*

Eftir at Katrín Jakobsdóttir hevði boðað forsetanum frá, at hon ikki megnaði at skipa meirilutastjórn, boðaði forsetin frá, fríggjadagin 25. november, at eingin hevði fingið litið upp í hendur, at stíla fyri skipan av stjórn. Í staðin, hevði forsetin heitt á allar floksformenninar um at umhugsa støðuna og royna at finna loysnir tvørturum vikuskiftið. Slík áheitan er einaferð áður komin frá forsetaembætinum, og tað var í 1980, tá táverandi forseti, Kristján Eldjárn, heitti á floksformennirnar á sama hátt, og tað eydnaðist tá.



*Mynd 4. Bjarni Benediktsson, formaður í Sjálfstæðisflokkinum.*

Sum skilst, so hava Sjálfstæðisflokkurin, Viðreisn og Björt framtíð fundast í vikuskiftinum, og ávís nærkan er at hóma. Røtt hevur verið um at fáa ein flokk afturat uppí stjórnarsamstarvið, tí hesir flokkar hava 32 av 63 altingslimum, ið júst er minsta mark fyri einum meiriluta. Nevndir hava verið Framsóknarflokkurin (8) ella Vinstrihreyfingin - grænt framboð (10). Hvat møguliga kemur burturúr hesum, sæst í næstum. Men tað er ikki óvanligt í Íslandi, at tað kann taka rúma tíð at skipa eina samgongu.

Um tað ikki skuldi eydnast flokkunum, sjálvum at skipa stjórn, so kann forsetin skipa eina uttantingsstjórn, men hetta er ikki aktuelt í løtuni, tí stjórnin, ið sat undan valinum, situr sum er, sum ein starvsstjórn. Eisini hevur forsetin heimild til at útskriva nýval, men hetta ger hann valla, uttan at tosa við formenninar í flokkunum fyrst og parlamentariska støðan er fastlæst.

## RÆTTA LØTAN AT ROYNA SEG Á ÍSLENDSKA MARKNAÐINUM?

Síðani fíggjarkreppan byrjaði á heysti 2008 lækkaði íslendska krónan (ISK) sera nógv, og tí gjørdust íslendskar vørur munandi meira kappingarførar mótvegis eitt nú føroyskum vørum. Hetta lága støðið á íslendsku krónuni, hevur hildið sær fram til 2015. Síðani tá er íslendska krónan byrjað at hækkað, og síðani mai 2016 er ISK hækkað nógv (sí myndina til vinstru). Frá 1. januar 2015 og fram til í dag er virðið av íslendsku krónuni hækkað meira enn 25% mótvegis føroysku krónuni. Alt annað eins, so merkir tað, at føroyskar vørur gerast 25% bíligari á íslendska marknaðinum í dag í mun til fyri smáum 2 árum síðani.




*Mynd 5. Sum tað sæst, so er íslendska krónan hækkað nógv í virði seinastu smáu tvey árini. Serliga síðani mai í ár er hon hækkað skjótt,*

Tað er ikki bert ISK sum er styrkt munandi seinastu 2 árini, men eisini er íslendski búskapurin styrktur munandi. Árligi búskaparvøksturin er stórur og kemst tað serliga av, at óvanliga nógv ferðafólk vitja í Íslandi. Í ár verður roknað við 1,7 mió. ferðafólkum og næsta ár verður roknað við uml. 2,2 mió. Lønarhækkingarnar eru stórar og talan er um munandi reallønarvøkstur hjá íslendingum. Nógv

byggivirksemi er í landinum. Serliga verða nógv hotell og bústaðir bygdir. Tað almenna stílar eisini fyri nógvum byggivirksemi.

Hækkandi ISK, nógv ferðafólk og harav nógv avleitt virksemi, stórur búskaparvøkstur, stórur reallønarvøkstur og ein høg nýtslukvota ger, at íslendski marknaðurin átti at verið áhugaverdur hjá føroyskum fyritøkum. Fleiri av teimum fyritøkum, sum eru á íslendska marknaðinum, hava stóran árligan vøkstur.

## SIRRI HEVUR GJØRT NÝTSLU AV HÝSINGARSKIPANINI HJÁ SENDISTOVUNI



*Mynd 6. Árni Brattaberg (h.m.), stjóri í Sirri og Petur Petersen (v.m.), sendimaður inni í leiguskrivstovuni hjá Sendistovuni*

Ullvøruvirkið Sirri var miðskeiðis í november mánaði og húsaðist í Sendistovuni (ein skrivstova, sum er gjørd til, at føroyskar fyritøkur kunnu koma og halda til í Sendistovuni í eitt styttri tíðarskeið. Hartil er eitt fundarhøli, sum fyritøkurnar kunnu nýta og ein salur er eisini í bygninginum, sum kann nýtast til vøruframsýningar o.a.).
Frammanundan, at Sirri kom til Reykjavíkar, hevði sendistovan gjørt yvirskipaðar marknaðarkanningar fyri at finna fram til, hvussu marknaðurin er skipaður og hvørjar sølurásirnar eru o.a.
Sirri hevði sambandi við fyritøkur innan ullvøruøkið og væl kom burturúr. Avtala er fingin í lag við fyritøku, sum ætlar at selja ávísar vørur hjá Sirri á íslendska marknaðinum. Henda fyritøka selur til uml. 140 handlar runt um Ísland. Aðrar fyritøkur hava víst áhuga í øðrum parti av vøruúrvalinum hjá Sirri. Ítøkiligar avtalur eru gjørdar og arbeitt verður við øðrum. Hetta má sigast at vera ein væl eydnað handilsvitjan, sum kann gerast ein týðandi marknaður.

## ÍSLENDSKA FORBOÐIÐ ÍMÓTI AT INNFLYTA FESKT KJØT, ER Í STRÍÐ VIÐ EBS SÁTTMÁLAN.



*Mynd 7. Stríðið um innflutt feskt kjøt, setti íslendska lóggávu til viks til frama fyri skyldur Íslands sambært EBS sáttmálanum.*

Í februar 2014 innflutti eitt íslendskt felag, Ferskar kjötvörur ehf., 83 kilo av feskum neyta búffum úr Hollandi. Felagið fekk innflytingarloyvi við teirri treyt, at kjøtið skuldi goymast fryst í ein mánað, áðrenn tað bleiv innflutt. Ferskar kjötvörur ehf. mótmælti hesi treyt, men mótmælið varð avvíst og tí bleiv kjøtið beint burtur. Felagið legði tí sak móti íslendska statinum, og kravdi endurgjald fyri kjøtið. Rætturin í Reykjavík bað um ráðgeving frá EFTA rættinum í samband við málið, og niðurstøðan hjá Rættinum í Reykjavík bar fram, at innflytingarbannið ímóti Ferskar kjötvörur ehf. gongur ímóti skyldum Íslands undir EBS sáttmálanum. Hetta kom fram í dómi frá Rættinum í Reykjavík fríggjadagin, 11. november. Íslendski staturin varð dømdur, at rinda felagnum Ferskar kjötvörur ehf. 1.909 € (keypsprísurin) + 80.606 ISK (flutningurin) + rentur og straff rentur umframt sakarmálskostnaðin 1.800.000 ISK (ella tilsamans uml. 122.500 DKK).

Lárus M.K. Ólafsson, løgfrøðingur hjá samhandilsfelagnum, segði í sambandi við dómin, at Altingi eigur at broyta lógirnar soleiðis, at tær samsvara við EBS sáttmálan, og ikki gera serliga reglur fyri innflyting av kjøti, sum stríða ímóti ábyrgd Íslands sum EBS land. Hinvegin segði Gunnar Bragi Sveinsson, fiski- og landbúnaðarráðharri, at hann undraðist á, hví Rætturin í Reykjavík gav forrætt til evropeiska lóg, heldur enn íslendska lóg. Ráðharrastovan umhugsar enn dómin, og tað er tí óvist, hvat aftursvarið verður, segði ráðharrin.

*Sí meira her (á íslendskum) og sí dómin her (á íslendskum)*

## FISKIMANNAVERKFALL Í ÍSLANDI

17. oktober í ár, meðan samráðingarnar vóru millum felagið hjá sjómonnum og felagið fyri reiðarar, boðaðu sjómenninir frá, at teir fóru í verkfall tann 10. november, um eingin semja fekst í lag áðrenn tað tíð. Hetta komst m.a. av, at nú

var krónan styrkt so mikið nógv, og avreiðingin tí minkað nógv í virði, so at lønin hjá fiskimonnum var minkað umleið 30–40%. Tí vildu sjómenninir hava afturbering fyri lækkingina umframt vanliga lønarhækkan. Av tí at eingin semja fekst í lag áðrenn 10. november, fóru áleið 3.500 sjómenn í verkfall. Flotin varð lagdur í nakrar dagar.
15. november varð semja funnin. SFS, sum er felagið hjá reiðarum og virkiseigarum, gjørdi nýggjan sáttmála við øll manningarfeløgini, sum er galdandi í 2 ár. Sjómenn fáa nú lutvíst afturborið fyri hækkaða virði av gjaldoyranum, og ávísar lønar- og frítíðartreytir eru broyttar. Nú er sáttmálin sendur til uratkvøðu, sum er fram til 14. desember.

*Meira her, her (kunning frá manningarfeløgum) og her (kunning frá SFS)*

## ÍSLAND STEVNIR ICELAND




Mynd 8. Iceland Foods hevur elt og vunnið nógv mál móti íslendskum virkjum, sum hava nýtt „Iceland“ í teirra umboðan ella sum part av teirra vørumerki, sjálvt í førum har vørur ella tænastur ikki kappast.

Eftir at hava samráðst við bretsku handilsketuna, Iceland, í fleiri ár um rættin hjá íslendskum fyritøkum at kunna nýta orðið “íslendskt” og “Ísland” í teirra vørumerki, hevur stjórnin í Íslandi nú stevnt handilsketuna Iceland í Bretlandi. Í fleiri ár hevur ketan forðað fyritøkum í Íslandi at brúka enska orðið “Iceland” í teirra marknaðarføring uttanlands. Hetta hevur Uttanríkisráðið í Íslandi boðað frá í einum tíðindaskrivi við heitinum “Ísland skal kunna brúka navn sítt”. Íslendska stjórnin ynskir, at feløg í Íslandi, sum útflyta vørur til onnur lond, kunnu brúka orðið Íceland, tá tey lýsa við teirra vørum, og tí hevur hon nú kært handilsketuna. Handilsketan hevur í fleiri ár stevnt íslendsk feløg, sum brúka orðið “Iceland” í teirra vørumerking.

Iceland ketan hevur einkarætt í Evropa til at nýta orðið “Iceland” í teirra vørumerki, og tí er íslendska stjórnin farin til rættin hjá ES, fyri at ógilda hendan einkarætt, av tí at tað er torført at lýsa íslendskar vørur, um man ikki kann brúka orðið íslendskt sum frágreiðing. Íslendskar vørur eru vælumtóktar kring Evropa, og tí er íslendska stjórnin stúrin fyri, at íslendskar fyritøkur ikki sleppa at marknaðarføra teirra vørur sum íslendskar. Ein íslendsk fyritøka eigur at kunna marknaðarføra við teirra vørum sum íslendskar, sigur Lilja Alfreðsdóttir, uttanríkisráðharri.

*Meira her (á enskum) og her (á íslendskum)*

## SIGMUNDUR DAVÍÐ GUNNLAUGSSON MEST ÚTSTRIKAÐI POLITIKARI HETTA VALIÐ.



Mynd 9. Sigmundur Davíð Gunnlaugsson var tað valevnið, sum fekk flestar útstrikingar á vallistanum. Orsøkin er óivað hansara luttøka í Panama-skjølunum.

Í mánaðarbrævinum fyri september, greiddu vit stutt frá íslendsku valskipanini, har skipanin er soleiðis, at flokkarnir gera av, hvør verður stillaður upp sum nr. 1, nr. 2 o.s.fr. og valevnini verða eisini vald í hesari røð. Hetta nevnist listaval. Um veljararnir eru ónøgdir við eitt valevni á tí lista, sum tey velja, so kunnu tey strika tað út.

Næstan 18% av veljarunum, sum valdu Framsókn í norðureystur valdøminum, strikaðu navnið hjá fyrrverandi forsætisráðharranum út. Sigmundur Davíð fekk tilsamans 817 útstrikingar. Hetta er eitt høgt tal, og sammetast kann við tann, ið fekk næstflestar útstrikingar á Framsóknarlistanum, Þórunn Egilsdóttir, sum varð útstrikað 57 ferðir. Hetta er tó ikki einastu fólkini, sum vórðu útstrikaði. Millum tey, sum eisini fingu nógvar útstrikingar, var Steingrímur J. Sigfússon hjá Vinstru Grønum, við 155 útstrikingum, meðan Björn Valur Gíslason, á sama lista, fekk 127.

Sigmundur Davíð segði seg vera keddan um, hvussu ógvusligt valstríðið hevur verið, og um tær mongu útstrikingarnar, men hann var takksamur fyri øll, sum hava stuðlað flokkinum og valt hann. Samstundis finnist hann at teimum, sum hava eggjað til útstrikingar, heldur enn at hjálpt flokkinum til eitt betri úrslit.

*Meira her og her (báðar leinkjur eru til íslendskar greinar)*

## ALTJÓÐA DAGUR TEIRRA LESANDI



*Mynd 10. Regin Winther Poulsen (v.m.), lesandi í HÍ og Rógvi Petursson, starvslesandi í Sendistovu Føroya á føroyska básinum.*

10. november var Altjóða Dagur á Háskúlanum í Reykjavík, og sendistovan luttók, sum umboð fyri Fróðskaparsetur Føroya, har hon bjóðaði teimum lesandi kunning um lesnað í Føroyum. Fleiri lond og sendistovur luttaka, har hvørt land bjóðar okkurt heimanífrá, samstundis sum tey veita kunning um møguleikar at lesa í teirra landi. Onkur vísti dans og bjóðaði bomm, meðan onnur bjóðaðu heitan mat og sodavatn frá teirra landi. Føroyska sendistovan hevði Sisu sodavatn frá Føroya Bjór og heimagjørt bróstsukur, sum tey lesandi høvdu møguleika at smakka. Serliga Sisu sodavatnið var rættiliga væl umtókt. Ein føroyskur lesandi í Íslandi, Regin Winther Poulsen, var eisini við og hjálpti at svara spurningum frá teimum altjóða lesandi. Tá tiltakið var liðugt, vóru næstan allir bóklingar og faldarar latnir, sera nógv lesandi, bæði íslendsk og útlendsk, høvdu vitjað føroyska borðið og víst tí áhuga, og alt sodavatnið var drukkið. Sostatt kann sendistovan staðfesta, at stórur áhugi er fyri Føroyum, bæði sum lestrar- og ferðamannaland millum ung lesandi.

## KUNNINGARFUNDUR UM FØROYAFERÐ FYRI SENDIHARRAR



*Mynd 11. Nøkur av sendifólkunum og teirra makar lýddu á, meðan sendimaðurin greiddi frá ferðini til FO.*

2. november skipaði sendistovan fyri kunningarfundi um ferð til Føroyar í mai á næsta ári fyri sendifólkunum og makum teirra. Stórur áhugi var fyri fundinum og fyri at luttaka í ferðini. Av teimum 16 sendifólkunum, sum eru í Íslandi, hava 13 teirra boðað frá luttøku, og má tað sigast at vera góð undirtøka. Ferðin er frá 19. til 22. mai 2017 og hevur Sendistovan áður skipað fyri slíkum ferðum í 2009 og 2013. Endamálið við hesari ferð er m.a. at vekja størri ans fyri Føroyar, styrkja diplomatisku sambondini millum Føroyar og tær sendistovur, sum eru staðsettar í Íslandi, eins og at styrkja støðuna hjá Sendistovuni í diplomatisku skipanini í Íslandi.

## JÓLATRÆIÐ TIL TÓRSHAVNAR KOMMUNU



*Mynd 12. Á myndini sæst frá vinstru Dagur B. Eggertsson, borgarstjóri, Petur Petersen, sendimaður og Cecilie Landsverk, norskur sendiharri. Í bakgrundini sæst jólatræið, sum skal latast Tórshavn.*

12. november varð sendistovan boðin við til eina hátíðarløtu í Heiðmörk í sambandi við, at borgarstjórin í Reykjavík skuldi fella jólatræið til Tórshavnar kommunu. Nógv fólk vóru komin saman til tiltakið, sum var eitt felags tiltak fyri jólatrøini, sum Reykjavík letur til Tórshavn og fyri fyrstu ferð til Nuuk. Annars hevur Reykjavík fingið jólatræ úr Oslo, men tað hevur víst seg, at tað ikki er sterkt nokk til íslendska veðurlagið, tí tað er brotnað fleiri ferðir. Tí varð gjørt av í ár, at jólatræið frá Oslo skuldi koma úr Heiðmörk, skógarøkinum, sum liggur eystanfyri Reykjavík. Borgarstjórin, Dagur B. Eggertsson, fór seinni í mánaðinum til Tórshavnar og var við, tá ið jólatræið skuldi tendrast á Vaglinum.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook